Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Sirið Stenberg løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Barnsburðartunglyndi

Spurningar:

1. Er tað rætt, at Psykiatriski Depilin ikki veitir hjálp fyri barnsburðartunglyndi í løtuni, og at samstarvið við Gigni tískil ikki er virkið?
2. Um ja, hvussu leingi hevur støðan verið soleiðis ?
3. Hvussu nógvar mammur vóru í samband við Psykiatriska Depilin árliga, tá ið skipanin virkaði?
4. Verða allar mammur framvegis screenaðar fyri barnsburðartunglyndi?
5. Hvør hjálp verður sett inn, nú tænastan hjá Psykiatriska Deplinum er óvirkin, og hvussu long er bíðitíðin hjá mammunum at sleppa framat?

Viðmerkingar:
Í nøkur ár hevur verið skipað samstarv millum Gigni og Psykiatriska Depilin um hjálp fyri barnsburðartunglyndi. Allar mammur hava havt í boði screening fyri barnsburðartunglyndi. Alt eftir hvør støðan er, hevur Gigni bjóðað eyka vitjanir, og um tørvurin hevur verið størri enn tað, sum Gigni kann bjóða, hevur mamman fingið hjálp frá Psykiatriska Deplinum. Sum skilst er tænastan frá Psykiatriska Deplinum ikki tøk í løtuni. Hetta ljóðar álvarsamt og kann hava stórar avleiðingar fyri nýggju familjuna.
Endamálið við at seta screeningina í verk var at seta hjálp inn skjótast tilber í samband við barnsburðartunglyndi vitandi, at støðan er álvarsom fyri menningina hjá barninum eins og mammu, og familjuna sum heild. Hetta er liður í fyribyrgjandi arbeiðnum á økinum og skal tryggja, at skjót, góð og kvalifiserað hjálp verður sett í verk. Álvarsemið í støðuni krevur skjóta viðgerð.
Tí hesir spurningar til landsstýrismannin fyri at fáa greiðu á, um tænastan er skerd, og hvør hjálp verður veitt í staðin.

Á Løgtingi, 20. juni 2022

Sirið Stenberg